
















Fleiri barna ansingarpláss

Klaksvíkar Býráð er sinna at økja normeringin av dagrøktina úr 65 fulltíðarbørnum upp í 90. Sosiala Nevnd hevur gjørt uppskot hesum viðvíkjandi. Økingin kostar 787.500 krónur, av hesum skal kommunan gjalda 236.250 krónur.

Fíggjarnevndin tekur undir við uppskotinum og skal býráðið á fundi í kvøld taka endaliga støðu. Tað er landsstýrið, sum geva endaliga loyvið.

Óli Heinesen, býráðsformaður sigur, at tørvurin á barnaansingarplássum er stórur í Klaksvík. Eini hálvtannaðhundrað børn eru á kommunala biðlistanum.

Javni grundstykki

Á býráðsfundinum í kvøld fer Klaksvíkar Býráð eisini at taka støðu til uppskot frá Fíggjarnevndini um Byggi- og Býarskipannarnevndina at alta felagnum Javna grundøki til stovn fyri menningartarna fólk í Norðoyggjum. Grundstykkið skal latast Javna ókeypis.

tór.-

Kjallari

Ynskist til leigu í nakrar mánaðar til goymslu.

KRISTOVU
Skúvaragøta 3 – Tlf. 1 0310